## Skipan av single kappingarárið 2019/2020

Single-kappingarnar vera 7 kappingardagar við tveimum kappingum pr dag. Allar kappingarnar verða leygardag og byrja verður kl 11.

Tilmelding fer fram á heimasíðuni dartfo.com inntil hóskvøld kl 22.

**Menn**

Fyrra kappingin hjá monnum verður skipað sum bólkaspæl, sum síðan verður deilt upp í eitt A-cup og eitt B-cup. Við 25-48 spælarum verður spælt í 8 bólkum og tað brúka vit útgangsstøðið í hesum skrivi. Vit kunnu tó enda í teirri støðu, at tað verða 4 ella 16 bólkar.

8 spælarar verða seedaðir eftir styrkilistanum (fyrstu kapping eftir listanum fyri 2018/2019).

Best av 5 settum í bólkunum

Nr. 1 & 2 í teimum 8 bólkunum fara víðari til A-cup 16 (7-7-7-9 sett)

Nr. 3 til 6 í teimum 8 bólkunum fara víðari til B-cup (5-5-5-5-7 sett)

Seinna kappingin hjá monnum verður skipað sum ein cup-kapping allan vegin. Eingin verður seedaður og nýtt lutakast verður fyri hvørt umfarð.

Spælt verður best av 7 settum allan vegin. Tó er finalan best av 9 settum.

Tilmeldingarfreistin til cup-kappingina er áðrenn semifinalurnar í B-cup í fyrru kappingini.

**Kvinnur**

Kvinnurnar eru ov fáar til at deila kappingina upp í A og B, so kvinnurnar spæla tvær kappingar á sama hátt hvønn dag.

Best av 3 settum í bólkunum og síðan fara 8 víðari í cup (5-5-7 sett)

Um fleiri enn 12 kvinnur melda til, verður seinna kappingin hjá kvinnum tó skipað sum ein cup-kapping allan vegin. Spælt verður best av 5 settum allan vegin. Tó er finalan best av 7 settum.

Tilmeldingarfreistin til fyrru kappingina er hóskvøld kl. 22. Tilmeldingarfreistin til seinnu kappingina er áðrenn semifinalunar í fyrru kapping.

## Stig til styrkilista:

**Kvinnurnar fáa stig á henda hátt:**

Nr. 1 fær 8 stig

Nr. 2 fær 6 stig

Nr. 3-4 fáa 4 stig

Nr. 5-8 fáa 2 stig

**Menninir fáa stig eftir trimum ymiskum skipanum.**

**Í A-cup verða stig givin soleiðis:**

Nr. 1 fær 24 stig

Nr. 2 fær 20 stig

Nr. 3-4 fáa 16 stig

Nr. 5-8 fáa 10 stig

Nr. 9-16 fáa 7 stig

**Í B-cup verða stig givin soleiðis:**

Nr. 1 fær 10 stig

Nr. 2 fær 8 stig

Nr. 3-4 fáa 4 stig

Nr. 5-8 fáa 2 stig

Nr. 9-16 fáa 1 stig

**Í seinnu kappinigi, sum er cup allan vegin, verða stig givin soleiðis:**

Nr. 1 fær 24 stig

Nr. 2 fær 20 stig

Nr. 3-4 fáa 16 stig

Nr. 5-8 fáa 12 stig

Nr. 9-16 fáa 8 stig

Nr. 17-32 fáa 4 stig

Í hesari kappingini er galdandi, at í mesta lagið tveir triðingar av luttakarunum fáa stig. (Dømi: Um 40 luttakarar eru, fáa bert 16 stig, tí 32 er meir enn 2/3 av 40.)

## Fyriskipan av kappingum:

Í hølinum skulu verða minst 10 skivur at spæla dystir á + 2 banar til upphiting (hesir hava ikki somu krøv til ljós o.a.).

Telda og printari skulu vera til taks (netsamband er ikki neyðugt).

Felagið, ið skipar fyri kappingini, setur ein kappingarleiðara. Hesin kann ikki spæla við í kappingini tann dagin, men kappingin telur við í luttøkuprosentið.

Kappingarleiðarin skipar kappingarnar eftir tí telduforriti, sum hann fær útleverað frá DSF.

Kappingarleiðarin ásetur skrivarar til allar dystir. Spælari kann eisini verða settur at skriva dyst í umfarinum eftir at hann er útsligin.

Víst verður annars til rundskriv um myndugleika hjá kappingarleiðara og atburð hjá leikarum.

## Luttøkugjøld:

Luttøkugjaldið er 100 kr. fyri hvørja kapping + 100 kr í árligum licensi (sami licensur er galdandi fyri single og double).

Feløgini gjalda 30% av luttøkugjaldinum til DSF. Henda upphædd verður brúkt sambært samtykini á eftirmetingarfundinum 2018.

**Uttanlandsferð:**

Á aðalfundinum var hetta samtykt viðvíkjandi uttanlandsferðum:

DSF sendir spælararnar, sum liggja nr 1 á endaliga styrklistanum hjá kvinnum og monnum, til kapping uttanlands.

**Kappingardagar:**

| | |
|---|---|
| 28. sep. 2019 | KDF |
| 9. nov. 2019 | HDF |
| 14. des. 2019 | D16 |
| 11. jan. 2020 | ADF |
| 15. feb. 2020 | Pílar & skot |
| 21. mar. 2020 | VDF |
| 18. apr. 2020 | Team Sandoy |

**FM-endaspæl í Fuglafirði**

FM-endaspælið verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 16. mai 2020. Endaspælið í single verður skipað eftir sama leisti, sum undanfarin ár (tað vil siga, fyrst bólkaspæl og so cup).

Við til endaspælið sleppa:

32 teir ovastu á styrkilistanum hjá monnum, sum hava verið við í minst 3 av 7 kappingardøgum.

8 tær ovastu á styrkilistanum hjá kvinnum, , sum hava verið við í minst 3 av 7 kappingardøgum.

Um avboð verða, sleppur næsti á listanum við.

Náa vit ikki upp á 32 menn og 8 kvinnur við teimum, sum hava verið við í minst 3 av 7 kappingardøgum, verður farið til tey, sum hava tikið lut í færri enn 3 kappingardøgum.